## Sigfríður skal venja B36

B36 hevur skrivað undir sáttmála við Sigfríð S. Clementsen, sum skal venja besta manslið felagsins í 2010. Sigfríður hevur áður verið venjari hjá B36, tí í 2006 stóð hann á odda fyri liðnum, sum vann meistaraheitið, og árið eftir vann liðið steypakappingina. Og bæði árini megnaði B36 eisini at spæla seg víðari í ávikavist UEFA Cup- og Champions League undankappingini. Við heimasíðuna hjá B36 sigur Sigfríður, at hann gleðir seg til uppgávuna og ætlar at stíla eitt sindur hægri, enn gjørt varð í farna kappingarári. Arbeitt verður við at styrkja liðið, og Sigfríður heldur, at hóast tað kanska er í so tíðliga at droyma um meistaraheitið, so ætlar hann, at liðið skal vera við, har tað er stuttligast.



# Okkum dámar høg mál

**– Møguleikin at vinna á europameistaranum hevur ongantíð verið størri, enn hann verður til EM-kappingina í Turkalandi um ein mánað, sigur Pál Joensen**



Pál Joensen kann við stoltleika staðfesta, at 1.500 metra teinurin nú er hansara í Norðurlondum, og um eina mánað fáa vit so at síggja, um hann tekur eitt týðandi tak aftrat á leiðini

Mynd: Jens Kr. Vang

Pál Joensen var uttan síðustykki høvuðspersónurin, tá móttøka var fyri World Cup-svimjarunum í gjár, og einki er at siga til tað. Serliga á 1.500 metra teininum í frísvimjing hevur hann sligið navn sítt fast. Fyrst við at vinna gull í Moskva og síðani við at vinna silvur í bæði Stockholm og Berlin, umframt at hann allar tríggjar ferðirnar setti norðurlendskt met.

– Nú er tað italska europameistaran, Federico Colbertaldo, eg kappist beinleiðis við, og nú eri eg ið hvussu er ikki líka bangin fyri honum. Tað vísir seg eisini, at eg havi ligið framman fyri hann 1.400 metrar, so nú mangli eg bara líka teir síðstu 100 metrarnar, so er tað komið upp á pláss, sigur Pál, sum í desember mánaði skal til EM í Istanbul í Turkalandi at vita, um tað kann gerast enn betri.

– Colbertaldo er avgjørt tann besti svimjarin, eg komi at svimja ímóti, og tað er góður møguleiki fyri, at eg kann taka hann í Turkalandi. Í øllum førum hevur møguleikin ongantíð verið størri, so vit vóna, at tað fer at bera til, tí vit seta okkum altíð høg mál.

Frammanundan hevur mesta kappingin verið við danskaran, Mads Glæsner, men eftir at hava verið aftan fyri Pál tvær ferðir, gav danskarin upp í Berlin, har hann valdi at lata vera við at svimja finaluna í 1.500 metra frísvimjing.

Almenna frágreiðingin var, at hann var móður, men Pál heldur, at Mads ikki tímir meira, nú tað tvær ferðir er blivið til eitt triðja pláss – aftan fyri Pál.

– Nú er 1.500 metra teinurin mín teinur í Norðurlondum, staðfestir Pál við stoltleika í eygunum.

### Svimja skjótari

Sum sagt, er EM-kappingin í Turkalandi tað næsta, sum er á skránni, og tí skulu svimjararnir nú »trappa niður«, sum tey rópa tað á svimjimáli.

– Ja, tað verður ein vika aftrat við harðari venjing, og so ræður um at slappa av og svimja eitt sindur nógv skjótari í Turkalandi enn nú. Tá átti at givið úrslit, og eg haldi tað vera gott tekn, at eg orki at svimja 1.500 metra teinin við mestsum somu tíð innan fyri eina góða viku, sigur Pál, ið var eitt sindur bilsin av, at tað gekk so væl á teimum trimum World Cup-stevnunum.

– Hetta var ikki ordiliga tað, vit høvdu væntað, tí tað var ikki fyrr enn síðst á árinum, at vit roknaðu við teimum góðu úrslitunum. Men hetta var ordiliga deiligt, og hetta hevur verið ein ordiliga góður túrur – bæði úrslitið og tað, sum eg annars havi fingið burturúr sum svimjari hesar dagarnar.

**hil**

# Móttøka fyri svimjarunum



Mynd: Jens Kr. Vang

**Seinnapartin í gjár skipaði Svimjisambandið fyri móttøku fyri svimjarunum, ið komu aftur til Føroya av World Cup-ferð**

Onkrastaðni millum whálvthundrað og hundrað fólk vóru komin á farstøðina í Havn seinnapartin í gjár at taka ímóti, tá svimjararnir komu aftur frá væleydnaðari World Cup-ferð. Svimjisambandið hevði lagt móttøkuna á farstøðini, tí meginparturin av ferðalagnum skuldi náa Smyril suður aftaná.

Jon Hestoy, formaður í Svimjisambandinum, bjóðaði vælkomin og presenteraði síðani errin svimjararnar, ein fyri og annan eftir – Monu Simonsen, Sheilu Millum Garðarnar, Paula Øssursson Mohr og Pál Joensen, umframt fysioterapeutin og mammu Pál, Thurid Kjærbo. Jón Bjarnason, venjari, var longu blivin barnabundin eftir heimkomuna og var ikki við til móttøkuna.

– Vegna Svimjisambandið er tað mær ein stór gleði at presentera ítróttarfólk, sum klára seg so væl, segði Jon Hestoy, áðrenn hann gav orðið til landsstýriskvinnuna við mentamálum, Helenu Dam á Neystabø.

Hon vísti millum annað á, at føroysk svimjing enn eina ferð hevði sett Føroyar í fokus uttanlands við framúrskarandi úrslitum, og hon segði úrslitini hjá Páli Joensen vera eina sensatión, sum fer um allan heim. Somuleiðis ynskti hon bæði svimjarum, venjarin, hjálparfólk og Svimjisambandinum tillukku við avrikinum.

– Svimjing krevur viljastyrki og støðufesti, og tit hava í ríkiligt mát víst, at tit eiga allar hesar dygdir. Tit røkja bæði skúla og arbeiði, og kortini hava tit orku til at venja bæði tíðliga og síðla. Vit onnur hava nógv at læra av tykkum, at røkka málum, sum vit seta okkum, segði landsstýriskvinnan.

Eftir røðuna handaði hon blómur, og tað sama gjørdi eitt umboð fyri Norðoya Sparikassa, sum er ein av høvuðsstuðlunum hjá Svimjisambandinum. Síðani takka Jon Hestoy øllum, sum vóru møtt upp, áðrenn hann rópti eitt leingi livi fyri svimjarunum, føroyskari svimjing og teimum fantastisku úrslitunum.

Síðani sluppu fjølmiðlar framat at gera samrøður við fyrst og fremst Pál, men eisini hini, umframt at svimjararnir stillaðu upp til myndatøku. At enda gjørdist klokkan so nógv, at fleiri av teimum, ið skuldu suður við Smyrli, mestsum máttu leypa avstað, men øll náddu suður, har eisini varð skipað fyri móttøkum. Fyrst, tá svimjararnir komu á Krambartanga, og síðani, tá ferðalagið var komið suður til Vágs. Tá var móttøka í Vilt-húsinum, har stundir góvust til, at fólk kundu heilsa upp á Pál og hinar svimjararnar.

**hil**